TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

**Frítíðarskúlan í Stoffalág 82 eftir:**
- einum pedagogi 30 tímar um vikuna
- tveimum hjálparfólkum 25 og 30 tímar um vikuna
- fólki til tvey reingerðarstørv 2 tímar um dagin

Størvini verða sett 6. august 2003

Leiðari Barbara Dahl, tlf. 314879
Stoffalág 82
FO 100 Tórshavn

**Dagstovnin við Botnánna í Kollafirði eftir:**
- tveimum hjálparfólkum til tíðaravmarkaði størv 25 tímar um vikuna í frítíðarskúla. Eitt starv frá 8. august 2003 til 12. mars 2004 og eitt starv frá 8.august 2003 til 8. februar 2004.
- einum hjálparfólki til tíðaravmarkað starv 25 tímar um vikuna í barnagarðsstovu frá 1. september 2003 til 1. apríl 2004
- einum pedagogi 30 tímar um vikuna frá 1. september 2003.

Leiðari Malan Jógvansdóttir, tlf. 421323 / 225323
FO 410 Kollafjørður

**Býlingshúsið Inni á Gøtu eftir:**
- tveimum pedagogum 35 tímar um vikuna at byrja 11. august 2003.

Leiðari Poula Eidesgaard, tlf. 317701
Ovaragøta 30A
FO 188 Hoyvík

**Frítíðarskúlan í Stoffalág 60 eftir:**
- tveimum pedagogum 30 tímar um vikuna
- einum hjálparfólki 20 tímar um vikuna
- fólki til eitt reingerðarstarv 15 tímar um vikuna

Fólkini verða sett 11. august 2003

Leiðari Maria Heinesen, 314364 / 214363
Stoffalág 60
Box 3316 FO 100 Tórshavn

**Býlingshúsið undir Brúnni eftir:**
- einum pedagogum 35 tímar um vikuna í vøggustovu

Starvið verður sett 15. august 2003

Leiðari Turid Horn, tlf. 319180 7 222905
Smærugøta 9
FO 100 Tórshavn

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt, og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til stovnsleiðaran ella til Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera stovninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni 2003.

**Barnaansingin**
Barnaansingin í Tórshavnar kommunu umfatar 64 dagrøktarar, 29 dagstovnar og 10 frítíðarskúlar við tilsamans 1.700 børnum í ansing.

**Frítíðarskúlin í Stoffalág 82**
Í frítíðarskúlanum ganga 67 børn, 46 børn fyrrapartin og 21 børn seinnapartin.

**Dagstovnurin við Botnánna í Kollafirði**
Í dagstovninum eru tvær stovur. Í frítíðarskúlanum ganga 25 børn 1.- 3. flokk, og í barnagarðsstovuni ganga 20 børn frá 4 til 6 ár.

**Býlingshúsið Inni á Gøtu**
Í býlingshúsinum ganga 42 børn. Stovnurin er skipaður við tveimum barnagarðsstovum við 21 børnum í hvørjari. Á stovninum eru 9 starvsfólk.

**Frítíðarskúlin í Stoffalág 60**
Í frítíðarskúlanum ganga 58 børn, 24 fyrrapartin og 33 seinnapartin

**Býlingshúsið undir Brúnni**
Í Býlingshúsinum undir Brúnni ganga 47 børn. Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum og einari vøggustovu. Á stovninum eru 11 starvsfólk.

www.torshavn.fo

Sosialurin
Sosialurin i

Toll- og Skattstova Føroya Vága øki

# Avloysarastarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága Øki

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hja landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Vága Øki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 11 starvsfólk.

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Vága Øki er avloysarastarv, at byrja sum skjótast og 5 mðr fram, svarandi til fulla starvstíð, leyst at søkja.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um tollarastarv, hvar arbeitt verður eftir vaktarplani.

Tann sum settur verður, kemur at arbeiða sum tollari og annars fjølbroytt skrivstovuarbeiði.

**Førleikakrøv**
Tað er ein fyrimunur at hava s.s. skrivstovuútbúgving e.l., navigatørútbúgving e.l., hava kunnleika til EDV, og enskt mál, annars at vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiði til rættis.
Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við telduarbeiði - kunnleika til EDV er ein treyt - og skal vera førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðnum. Tað er eisini ein fyrimunur við arbeiðsroyndum innan lóggávuna sum Toll- og skattstovan umsitur.

**Setunarviðurskifti**
Løn og setunarviðurskifti verða ásett eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um útbúgving, arbeiðsroyndir og møgulig viðmæli skulu sendast til Toll- og Skattstovu Føroya, Vága øki **innan 13 juni 2003.**

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Elsu Brimvík, økisstjóra á tlf. 357700.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Vága Øki
380 Sørvágur



Nýtt skeið til motorsúkklukoyrikortið byrjar týsdagin 3. juni kl. 19.30

# Føroya Koyriskúli

v/ **John Christiansen**, koyrilærari
Suðuroyarvegur 11 • FO-100 Tórshavn • Tel 21 47 75





## Listaframsýning á ólavsøku

Lions Club Tórshavn skipar aftur í ár fyri listaframsýning í Müllers Pakkhúsi á ólavsøku.
Opið verður 27. - 29. juli kl. 14.00 - 20.00
og 30. juli kl. 16.00 - 20.00.
Hevur tú hug at taka lut í hesi framsýning, set teg so í samband við Lions Club Tórshavn á telefon 313197, 311817, 421552 ella 213816 áðrenn 15. juli.

**LIONS CLUB TÓRSHAVN**

SISERO 351800

## Røkir útvarðið sínar skyldur á ein nøktandi hátt?

Almennur fundur í Johns Restaurant í Runavík mánakvøldið 2. juni kl. 20.

Fjølmiðlagranskarin Eyðun Andreassen, útvarpsstjórin Jógvan Jespersen, politikarin Óli Breckmann og fyrrverandi landsstýrismaðurin Ivan Johannesen leggja fyri við evninum: **Røkir Útvarp Føroya sum almennur fjølmiðil sínar skyldur á ein nøktandi hátt?**

Aftaná verður orðaskifti

**Eysturoyar Fólkafloksfelag og Samhald**

Sosialurin 341800

## Campingbilur



## Mercedes Benz MB100 til sølu

frá 93, koyrt 137.000 km, el-spegl, wc, vask, køliboks, 6 sitipláss, 2 sovipl. + 1 barn, sleipikrók, ABS og oljufýr. 2 akkumolatorar. CD/kasette. Síðutelt.

**Tlf. 257360**

## Samfelagsstevnan í Klaksvík

Um Gud vil verða hesi møti í Klaksvík á hvítusunnu:

***Í Betesda***
**Hósdagin 5. juni**
kl. 20.00: Bønarmøti

**Fríggjadagin 6. juni**
kl. 20.00: Uppbyggingarmøti

***Í KÍ-høllini***
**Leygardagin 7. juni**
kl. 20.00: Evangeliskt møti*
kl. 22.00: Opið hús

**Sunnudagin 8. juni**
kl. 10.00: Breyðbróting
kl. 12.30: Sunnudagsskúli
kl. 16.00: "Síggið markirnar"*
kl. 20.00: Evangeliskt møti*
kl. 22.00: Opið hús

**Mánadagin 9. juni**
kl. 10.00: Uppbyggingarmøti
kl. 16.00: Sangmøti*
kl. 19.00: Evangeliskt møti*

*Barnaansing verður á loftinum í KÍ høllini.

Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Samkoman í Betesda**

Sosialurin 341800



# Prísbroytingar

Frá 1. juni verða prísirnir ímillum Vágar og Tórshavn broyttir.

Nýggir prísir fyri mánaðarkort verða:

- Sandavág - Tórshavn **kr. 1050,-**
- Miðvág - Tórshavn **kr. 1200,-**
- Sørvág - Tórshavn **kr. 1200,-**

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo

REPROZ

## Lærari til Viðareiðis Skúla

Viðareiðis Skúli søkir eftir lærara í tíðaravmarkað starv at undirvísa fulla tíð skúlaárið 2003-4

Umsóknir og møgulig viðmæli skulu sendast Viðareiðis Skúlastýri við Lenu Heinesen ella sendast við t-posti til vidskuli@post.olivant.fo

Freist týsdagin 10.06.2002 á miðdegi.

Løn smb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Viðareiðis skúlastýri**
v/ Lenu Heinesen
Fo-750 Viðareiði

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

# Umsitingarleiðari

Starvið sum deildarleiðari í umsitingini á Løgmansskrivstovuni er leyst at seta frá 1. august 2003.

**Starvið**
Umsitingarleiðarin hevur í høvuðsheitum ábyrgdina av:
- Fíggjar- og roknskaparmálum
- Starvsfólka- og lønarmálum
- Skjalaskráseting og øðrum umsitingarmálum
- KT-viðurskiftum
- Ognunum í Tinganesi
- Stovnstrygd

Harumframt skal deildarleiðarin taka sær av búskaparligum spurningum og kunna standa fyri búskaparligum verkætlanum sum til dømis at samskipa einskiljing av fyritøkum landsins.

Umsitingarleiðarin hevur ábyrgdina av menningini á deildini og skal tryggja, at uppgávurnar verða loystar á høgum fakligum støði.

**Faklig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving frá hægri lærustovni innan samfelagsvísindi, heruppií búskaparfrøði, ella á øðrum samsvarandi útbúgvingarstigi.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar skulu vera væl fyri fakliga, hava vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting, góð samstarvsevni, vera tænastuhugaðir, miðvísir og duga at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er fyrimunur, at umsøkjarar hava arbeiðsroyndir innan tær uppgávur, sum liggja í starvinum, og hava innlit í almennu fyrisitingina. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Løn- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Tann, ið verður settur, skal tola tillagingar og broytingar í starvinum. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli (c.v.) o.ø. skulu vera Løgmansskrivstovuni, FO-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2003.

Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, á tlf. 35 10 10, at fáa nærri at vita um starvið.

Løgmansskrivstovan styðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

Sosialurin 341800

## Hús í Bø til sølu

Eini sethús í Bø til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 332376 ella 332813**